Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Ábøtur á Skúlanum á Trøðni

Spurningar:

1. Er ætlanin at gera nakað við uttanduraøkið á Skúlanum á Trøðni við atliti til at stimbra kropsligu og sansaligu menningina hjá børnunum á skúlanum?
2. Er tørvur á ábøtum viðvíkjandi ljósi, ljóði og viðlíkahaldi annars innandura?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at seta neyðuga peningin av til dagføring av uttandura og, um neyðugt, eisini innandura økjunum, so at fysisku karmar skúlans verða dagførdir?
4. Er nøkur meting av, hvat ein møgulig dagføring av ávikavist uttan- og innandura økinum kostar?

Viðmerkingar:

Skúlin á Trøðni er einasti serskúli í Føroyum, har børn við serligum tørvi úr øllum landinum fáa eitt skúlatilboð. Skúlin var liðugt bygdur í 1976 og hevur bygningurin sostatt meir enn 45 ár á baki. Hesi nógvu árini tykist ikki nógv at vera broytt, tá ið tað kemur til uttanduraøkið á skúlanum.

Á skúlanum ganga 53 næmingar í aldrinum 7-18 ár. Børn við serligum tørvi hava ofta eisini kropsligar avbjóðingar og tí tørv á einum stimbrandi umhvørvi bæði inni og úti. Skúlin hevur ein skúlagarð av asfalti. Har eru nógvir kantar, ið børnini kunnu snáva um og sum heild er garðurin ikki innbjóðandi at spæla í. Ein sær t.d. ongar reiggjur ella aðrar spennandi leikur, ið hava til endamáls at stimbra spæl og gera mun í kropsligu menningini av børnunum.

Skúlin sjálvur er gamal og kann tykjast slitin. Til dømis hevði tað verið áhugavert at vitað, hvussu er við viðlíkahaldi og hvussu við ljóðdoyving havandi í huga, at summi børn við serligum tørvi eru sera viðkvom, tá ið tað kemur til larm og óljóð.

Fyri at fáa greiðu á, hvat landsstýrismaðurin ætlar á økinum, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 3. oktober 2022

Eyðgunn Samuelsen